# Trettandi

**Trettandi dagur jóla er farin afturum, og harvið rokna vit jólini at vera av. Ymsir siðir verða hildnir í samband við hendan dag**

TRETTANDI
*Edvard Joensen*



*Kópur verður tíðum settur í samband við trettanda. Og tá kópur verður nevndur, hugsa nógv fólk bert um tann lítla, hvíta, lodna hvølpin, sum tey halda vera so fittan*
*Mynd: Edvard Joensen*

Ymsir eru siðirnir, sum knýttir eru at trettanda. Bæði kirkuligir og verðsligir.

Gamalt er, at trettandi verður settur í samband við vísmenninar í Nýggja Testamenti, sum komu úr Eysturlondum at tilbiða nýborna jødakongin, sum teir ikki vistu meira um enn so.

Hjá okkum eru aðrar søgur havdar á lofti um trettanda. Serliga við dansi og leiki. Bæði hjá heidnum og kristnum.

Sagnir eru kendar um kópakonur ymsastaðni bæði her heima og í grannalondum okkara. Her hjá okkum vóru tvær. Bæði í Skálavík og so tann best kenda í Mikladali. Hendan, sum byrjaði á trettanda ella um gomlu jól, sum Kópakvæðið sigur.

»Tað var áður í fyrndini, har av gekk nógv hól. Kópar hildu leik og spæl, saman um gomlu jól.«

Tá kóparnir kundu dansa og leika á trettanda, so kundu vit væl eisini. Og gjørdu tað so.

## VEÐRIÐ




**Í dag,**
Stívt andøvsgul til strúk í vindi av útsynningi. Tað verður skýggjað við regni ella ælaveðri. Hitin fer at liggja um 5 stig

**Veðrið leygardagin, sunudagin og mánadagin**




Gul til stívt andøvsgul vestaneftir. Tað verður yvirhøvur skýggjað og ælaveður. Kanska sum heglingur ella vátaslettingur. Hitin fer at liggja nakað oanfyri frostmarkið. Seinni gongur hann í landsynning og frískar vindin, og tað verður lýggjari

## LUFTTRÝSTIÐ




Eit lágtrýst við Føroyar gongur í ein landsnyrðing. Kølin luft við ælaveðri kemur vestaneftir inn yvir Føroyar.



Eitt lágtrýst við kaldari luft fór hósdagin fram við Føroyum vestaneftir. Seinni í vikuni kemur eitt nýtt brúgvalag av útsynningi móti Føroyum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -17 |
| Nuuk | -12 |
| Qaqortoq | -15 |
| Ammassalik | -7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -1 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 6 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 2 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 5 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 13 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 11 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 16 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 34 |

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 5/1 kl. 06[00]–6/1. 06[00]. Hitin í gjár: 3,5°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° - Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 16,0 mm – mált frá 5/1 kl. 06[00]–6/1 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 62,4 mm

## ÚF Morgunlestrar
**10.– 15. januar**

***Eilif Samuelsen, úr Havn, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 10. januar:**
nr. 535 Nú árið tað hvarv og fór undir kav

**Týsdagin 11. januar:**
nr. 135 Í Jesu navni, Faðir vár

**Mikudagin 12. januar:**
nr. 578 Nú byrja vit í Jesu navn
nr. 582 Lov og tøkk eg tær fram beri

**Hósdagin 13. januar:**
nr. 255 Vár Gud er føst og haldgóð borg
nr. 315 Givnir eru einglar góðir

**Fríggjadagin 14. januar:**
nr. 478 Vár trúgv várt fasta álit er

**Leygardagin 15. januar:**
nr. 330 Yndislig, føgur
nr. 347 Fyri halgu føðing tína

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

10. januar — Tendring/Mánin næstur jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. Jan | 03.11 | 15.40 | 02.11 | 14.40 | 02.26 | 14.55 | 05.11 | 17.40 | 06.11 | 18.40 | 01.26 | 13.55 | 00.26 | 12.55 | 03.26 | 15.55 | 04.26 | 16.55 | 02.56 | 15.25 | 04.11 | 16.40 |
| 8. Jan | 04.05 | 16.37 | 03.05 | 15.37 | 03.20 | 15.52 | 06.05 | 18.37 | 07.05 | 19.37 | 02.20 | 14.52 | 01.20 | 13.52 | 04.20 | 16.52 | 05.20 | 17.52 | 03.50 | 16.22 | 05.05 | 17.37 |
| 9. Jan | 05.05 | 17.38 | 04.05 | 16.38 | 04.20 | 16.53 | 07.05 | 19.38 | 08.05 | 20.38 | 03.20 | 15.53 | 02.20 | 14.53 | 05.20 | 17.53 | 06.20 | 18.53 | 04.50 | 17.23 | 06.05 | 18.38 |
| 10. Jan | 06.08 | 18.40 | 05.08 | 17.40 | 05.23 | 17.55 | 08.08 | 20.40 | 09.08 | 21.40 | 04.23 | 16.55 | 03.23 | 15.55 | 06.23 | 18.55 | 07.23 | 19.55 | 05.53 | 18.25 | 07.08 | 19.40 |
| 11. Jan | 07.11 | 19.43 | 06.11 | 18.43 | 06.26 | 18.58 | 09.11 | 21.43 | 10.11 | 22.43 | 05.26 | 17.58 | 04.26 | 16.58 | 07.26 | 19.58 | 08.26 | 20.58 | 06.56 | 19.28 | 08.11 | 20.43 |

Kelda. Álmanakkin 2004

5 707265 100050 >